Sosialurin



# Fobiskeið

**Hevur tú onkra fobi – er sera bangin fyri onkrum ávísum – kanst tú fáa góða viðgerð og samstundis læra teg at viðgera teg sjálva/sjálvan.**

Skeiðið verður tann 19. og 20. sept. kl. 10.00-16.00.

Stað: Tinghúsvegur 18, Tórshavn

Tilmelding á tlf. 21 82 86

## SÁLARFRØÐIDEPILIN V/JEGVAN BÆK

AUT. SÁLARFRØÐINGUR
TINGHÚSVEGUR 18
TÓRSHAVN



KOLLAFJARÐAR SKÚLI

## LÆRARAR TIL KOLLAFJARÐAR SKÚLA

Vegna farloyvi verður søkt eftir lærara til Kollafjarðar skúla at byrja 20. oktobur 2008.

Starvið er fulltíðarstarv, ið er sáttmálasett og tíðaravmarkað til 30. juni 2009.

Í Kollafjarðar skúla ganga 134 næmingar í 1. til 9. flokk.

15 lærarar at starvast í skúlanum.

Kollafjarðar skúli er ein eitt-sporaður skúli við 9 árgangum.

Vit arbeiða í trimum deildum við einum læraratoymi í hvørjari deild.

Býtt er soleiðis: 1.-3. flokkur, 4.-6. flokkur og 7.-9. flokkur.

Vit sóknast eftir lærara, ið kann átaka sær undirvísing í yngstu deildini.

Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Tó kann annað fólk verða sett, um eingin lærari søkir.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2.

Umsókn saman við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum, verður at senda til:

Kollafjarðar skúla
Botnavegi 2
FO-410 Kollafirði

í seinasta lagi mikudagin 24. septembur 2008 kl. 12.00.

Eru spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlastjóran, Karin Hammer, á tlf. 30 25 53 ella 22 14 07 ella á teldupostbústaði karin.hammer@skulin.fo.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Starv á Fróðskaparsetri Føroya

Endurlýsing

## Lektari/adjunktur í samfelagsfrøði

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í samfelagsfrøði leyst at søkja. Starvið verður sett sum lektarastarv, og tann ið settur verður, skal virka fyri at menna gransking, útbúgving og undirvísing í samfelagsfrøði á deildini. Um so er at eingin við lektaraførleika søkir, kann starvið verða sett sum adjunktstarv.

**Starvsøki:**
Granskingarparturin verður tengdur at serøki umsøkjarans. Samstarv innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um at hava ábyrgd av útbúgvingini í stjórnmálafrøði og breiðari samfelagsfrøði og at undirvísa. Tann, ið settur verður, skal eisini vera við til at endurskoða núverandi B. S.Sc.- útbúgving í stjórnmálafrøði, áðrenn studentar verða tiknir upp til nýtt nám at byrja á heysti 2009.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu umframt kandidatútbúgving sum stjórnmálafrøðingur ella líknandi frøðigrein hava granskaraútbúgving á Ph.d. stigi og undirvísingarroyndir. Verðrur starvið sett sum adjunktstarv, skal umsøkjarin vera ávegis í eini granskaraútbúgving ella saman við umsókn ini senda eitt verkætlanaruppritum slíka.

Við umsóknum skulu fylgja avrit av vísindaligum avrikum í trimum eintøkum, eins og umsøkjarar skulu lýsa undirvísingarroyndir sínar.

Sett verður metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sínar førleikar.

Starvið verður at seta sum skjótast. Umsóknarfreistin er 12. september 2008.

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda tær til deildarleiðaran Elin Súsonnu Jacobsen, telefon 352583/226495, elinsj@setur.fo ella til Beintu í Jákupsstovu, telefon 352582, beinta@setur.fo. Upplýsingar um virksemi á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo

Umsóknir skulu sendast til:

**Fróðskaparsetur Føroya**

J.C. Svabos gøtu 14 – Postrúm 272 – FO-110 Tórshavn

LANDSGRANNSKOÐANIN

## LANDSGRANNSKOÐANIN søkir eftir starvsfólki

Søkt verður eftir starvsfólki at byrja 1. november 2008 ella eftir avtalu. Arbeiðið á stovninum er áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt og fevnir um at grannskoða almennar stovnar, skipanir og virkir. Eisini ber til at laga arbeiðsuppgávur eftir førleika og áhuga.

**Førleikakrøv:**
Hægri útbúgving innan grannskoðan, roknskap, løgfrøði, kunningartøkni o.l., ella royndir innan almenna ella privata umsiting eru avgjørt fyrimunir, men ikki treytir.

Vit leggja dent á, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er arbeiðssamur, nærlagdur, dugir væl at skriva og samskifta við stovnar og starvsfelagar.

**Útbúgvingarmøguleikar:**
Á Landsgrannskoðanini bjóða vit starvsfólki okkara útbúgving og eftirútbúgving. Vit samstarva við norðurlendsku ríkisgrannskoðanirnar, og í tí sambandinum stendur starvsfólkunum í boði at fara á skeið ella at arbeiða styttri tíðarskeið í hinum norðurlondunum.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum o.ø. skal sendast til:
Landsgrannskoðanina
Traðagøta 43
Postrúm 2053
165 Argir

ella sum teldupostur: postur@lg.fo.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. september 2008. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Beintu Dam, á tlf. 355100. Fyrispurningar verða viðgjørdir í trúnaði.

Tú kanst fáa meira at vita um Landsgrannskoðanina á heimasíðu okkara: www.lg.fo.

LANDSGRANNSKOÐANIN er ein óheftur stovnur undir Løgtinginum, sum virkar sambært Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." Landsgrannskoðanin ansar eftir, at landsroknskapurin er rættur, at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar, at peningurin er brúktur samsvarandi galdandi játtanum, lógum og fyriskipanum, og at umsitingin er sparin og virkin. Landsgrannskoðarin er skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum, og tí fyrireikar og avgreiðir Landsgrann¬skoðanin mál vegna løgtingsgrannskoðararnar, sum m.a. gjøgnumganga og leggja almennar roknskapir fyri Løgtingið at góðkenna.

## Bátur til sølu

6 mannafar til sølu, við fiskiloyvi, sum krevur ábøtur.

Kostnaður 10.000,00 kr.

**Ring á tel. 218240**

## Íbúð ynskist

Íbúð ynskist til leigu í Havn frá 1. januar 2009 til eldri mann. Eri friðarligur og fari væl um.

Ring á tlf. 211322